# Miðlamjarr

At koyra busskortið í vaski-maskinuna er ikki ein góð loysn!
***Maður, 23 ár***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



*Eftir eina tíð hevur tú ikki ánilsi av, hvussu gomul tú ert, tí tú hevur logið so ofta*

Sjónleikarin Sandra Bullock

Soleiðis, um 12 ár ber til at keypa eina single malt, sum er framleidd í Føroyum.
***Maður, 45 ár***

Nú hevur løgtingið syrgt fyri, at vit kunnu liggja í spritti. Nú manglar bara, at vit liggja í stjórnarloysi!
***Maður, 43 ár***





*Í okkara demokratii eru slíkir dómarar sum krabbamein*

Silvio Berlusconi heldur lítið um dómararnar í rættinum í Milano, har hann er ákærdur fyri svik



*Eg eri púra málleysur, at óeydnan blívur við at fylgja okkum upp á henda mátan*

Hans Andrias Joensen, stjóri á Thor, um eldsbrunan á Athenu (Dimma)

*Hetta hevur alt at siga*

Danska songkvinnan Medina er við at fáa gjøgnumbrot í USA (TV2)



*Nær er tað ein, sum reisir seg upp og sigur, at ja, eg eri dovin, og tí vigi eg ov nógv*

Tróndur Vatnhamar, sum hevur klænkað seg 50 kilo (Dimma)



*Tað er øgiliga stuttligt sum bilar floyta og blunka við ljósinum til mín, og fólk heilsa alla somlu tíðina, og tey eru øgiliga blíð*

Robin Clementsen í góðum lag á seinasta teinum av 3466 kilometra lang rennitúrinum suður ígjøgnum Europa (Sosialurin)